Backe gevst í City

Fyrrverandi venjarin hjá Toda Jónsson, Hans Backe, hevur í ár virkað sum hjálparvenjari hjá Sven Goran Eriksson í Manchester City, men fyribils hevur hann valt at gevast í hesum sessinum. Talan er um sjúku í nærmastu familjuni hjá væl lýdda svianuml,og tí hevur hann fyribils valt at fara í sjúkrafarloyvi. Enn er ikki greitt, hvørt talan verður um varandi fráveru, ella um Backe kemur aftur til City seinni í hesum kappingarárinum.

1. deild menn

		dystir	v	-	j	-	t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1	B68	23	20	-	2	-	1	70	16	54	62
2	ÍF	23	15	-	4	-	4	65	20	45	49
3	FSV04	23	15	-	3	-	5	42	27	15	48
4	LÍF	23	12	-	1	-	10	58	39	19	37
5	TB	23	11	-	4	-	8	44	26	18	37
6	HB	23	9	-	2	-	12	34	43	-9	29
7	NSÍ	23	8	-	1	-	14	38	58	-20	25
8	SÍ	23	6	-	3	-	14	31	55	-24	21
9	KÍ	23	5	-	2	-	16	23	58	-35	17
10	B36	23	2	-	2	-	19	19	82	-63	8

ÍF og FSV borð um borð

Við heimasigri á SÍ tryggjaði B68 sær gullkrónurnar, og í botninum er støðan, sum hon hevur verið seinastu vikurnar

Toftamenn hava av sonnum verið flúgvandi í alt ár. Seinasta umfar varð uppflytingin tryggjað, og nú eru gullmerkini so eisini heima

FÓTBÓLTUR

Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Tað gongur sína gongd í næstbestu deildini. Bæði í toppinum og í botninum. Hetta umfarið var eyðkent av, at ikki færri enn 24 mál vórðu skorað í teimum fimm dystunum ella næstan fimm mál í miðal.

B68, sum longu frammanundan hevði tryggjað sær uppflytingina, vann við 3-0 sigri á SÍ, gullkrónurnar. Líkindini vóru einki serlig á Svangaskarði, har SÍ hevði sera lítið at bjóða uppá. Hetta var eftir øllum at døma ikki dysturin, sum teir dúvaðu uppá skuldi tryggja teimum undan niðurflyting.

Jann Ingi Petersen sendi fríspark úr stórari fjarstøðu í vinstru beinleiðis í málið, Dánial Hansen umsetti innlegg úr høgru frá Alex Troleis til mál, og tíggju minuttir undan dystarenda staðfesti Kristian Anton Andreasen sigurin, eftir at innskifti Jónleif Højgaard hevði átti næstsíðsta fótin á.

ÍF og FSV04 eru í tættari kapping um seinna uppflytingarplássið. Bæði liðini fingu fult. Vágamenn áttu torføraru uppgávuna, tá ið teir spældu ímóti HB í Gundadali. FSV04 vann 2-0 ímóti blaðunga HB liðnum, sum tóktist resta meiri royndan stýrimann.

Gunnar Haraldsen skoraði til 1-0 tíðliga í 1. hálvleiki eftir hornasparksinnlegg, og fram ímóti dystarenda økti Jógvan Holm til 2-0 eftir gott innlegg úr vinstru frá Sigtóri Petersen. Sigurin var serliga kærkomin, tí FSV04 mesta partin av 2. hálvleiki var undirmannað.

ÍF vann trivaligan sigur á NSÍ, men tað tók sína tíð, áðrenn fuglfirðingar fingu málini. NSÍ hevði havt bóltin í ÍF málinum, áðrenn Jan Ellingsgaard setti hol á. NSÍ málverjin var ikki sakarleysur í tí støðuni. Stutt undan steðginum økti Atli Petersen við góðum skoti av brotsteigarmarkinum, og síðstu sjey minuttirnar skoraði ÍF trý mál afturat.

Nú leygardagin fara ÍF og FSV04 at spæla í Sandavági. Úrslitið í tí uppgerðini verður rættuliga avgerandi fyri uppflytingina.

TB og B36 hava seinastu vikuna spælt tvær ferðir. TB hevur vunnið báðu ferðirnar, men tá ið teir næstsíðsta leygardag vóru í Gundadali, stóð nógv á, áðrenn TB í evstu løtu skoraði sigursmálið til 2-1. Á Sevmýri leygardagin var eingin ivi. B36 hevði eitt skot upp á mál, og stóri maðurin hjá TB var Olivur Abrahamsen, sum skoraði fýra ferðir. Hann gjørdi eisini bæði málini næstsíðsta leygardag.

Í Leirvík hevði KÍ lítið at bjóða uppá, hóast Stefan Kalsø eftir horna legði klaksvíkingar framum. Andreas Lava Olsen skoraði tríggjar ferðir fyri LÍF, KÍ veteranurin Arnhold Joensen skoraði tvær ferðir, umframt at hann var við í uppspælinum til fleiri av hinum málunum, og liðformaðurin Sølvi Vatnhamar skoraði eina ferð. Adrian Joensen plagar at teljast millum LÍF málskjúttarnar. Hann noyddist tíðliga av vøllinum, tí hann var skaddur.

Máltindurin

Dánjal Hansen	B68	17
Olivur Abrahamsen	TB	17
Jósup Henriksen	B68	16
Andreas Lava Olsen	LÍF	16
Andrzej Stretowicz	FSV04	14
Tróndur Sigurðsson	HB	12
Bartal Eliasen	ÍF	12
Nenad Saric	ÍF	12
Alexandro Castilho	B68	11
Adrian Joensen	LÍF	11
Sonni L. Petersen	NSÍ	11
Sølvi Vatnhamar	LÍF	9
Jørgin Meitilberg	SÍ	9
Jann Ingi Petersen	B68	7
Jovan Panic	FSV04	7
Øssur Dalbúð	NSÍ	7
Jens Erik Rasmussen	SÍ	7

FAKTA um 1. deild

Útsettur dystur 8. september

B36-TB 1-2 (0-1)
0-1: Olivur Abrahamsen
1-1: Sjúrður Thomassen
1-2: Olivur Abrahamsen

23. umfar 15. september

B68-SÍ 3-0 (2-0)
1-0: Jann Ingi Petersen
2-0: Dánial Hansen
3-0: Kristian Anton Andreasen

ÍF-NSÍ 5-0 (2-0)
1-0: Jan Ellingsgaard 26.
2-0: Atli Petersen 43.
3-0: Tórður Lervig 83.
4-0: Nenad Saric 87.
5-0: Frank Poulsen 90.

LÍF-KÍ 6-1 (2-1)
0-1: Stefan Kalsø
1-1: Andreas Lava Olsen
2-1: Arnhold Joensen
3-1: Andreas Lava Olsen
4-1: Søvli Vatnhamar
5-1: Andreas Lava Olsen
6-1: Arnhold Joensen

HB-FSV04 0-2 (0-1)
0-1: Gunnar Haraldsen
0-2: Jógvan Holm
Reytt kort: Mortan Joensen, SÍF, 47. (2 gul)
Tróndur Sigurðsson, HB, 87. (2 gul)

TB-B36 7-0 (6-0)
1-0: Olivur Abrahamsen 5.
2-0: Olivur Abrahamsen 6.
3-0: Dan Mortensen 10.
4-0: Gunnleif Olsen 34.
5-0: Sasa Jovanovic 42.
6-0: Olivur Abrahamsen 45.
7-0: Olivur Abrahamsen 62.